

*– Tað er her, úti í Nesi í Hvalba, at ætlanin nú er fara undir royndir við toskaaling*

# Ætla at ala tosk í Hvalba

**Hvalbingar samstarva við norðmenn um ætlaða toskaaling í Hvalba**

TOSKAALING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú er ætlanin at fara undir at ala tosk í Hvalba.

Á fundi í bygdaráðnum í Hvalba týskvøldið var ein umsókn til viðgerðar um at útvega eitt øki til at gera royndir við toskaaling á.

Tá ið føroyingar hava tosað um aling, hevur tað nú í nógv ár bara verið hugsað um laks. Men seinastu mánaðirnar eru fleiri og fleiri farin at tosa um at ala tosk og nú liggja eisini hvalbingar framvið.

Tað er Mikkjal Hammer, vanliga nevndur Mikki, skipari og reiðari í Hvalba, sum nú tekur stig til at fara undir toskaaling í Hvalba.

Hann hevur tikið upp samstarv við fyritøkuna Eco-Farm í Noregi og saman við teimum, ætlar hann at royna at ala tosk í Føroyum við teirr tøkni og teirri vitan, sum Eco-Farm hevur ment á økinum.

– Eco-Farm hevur roynt sína vitan og sína tøkni til toskaaling áður og úrslitið hevur verið nøktandi, verður sagt í umsóknini til Hvalbiar Kommuna.

### Ala í kørum á landi

Ætlanin er at ala toskin í stórum kørum á landi og gevur hendan royndin nøktandi úrslit, vóna teir at kunna fara undir aling á vinniligum grundarlagið aftaná.

Kørini eru stór, einar 15 metrar í diametur.

Teir siga, at hendan fyrsta royndartíðin kemur at varaa eitt til hálvtannað ár og hesa tíðina koma 2-3 fulltíðarstørv at vera knýtt at virkseminum.

Sostatt søkja teir nú kommununa um at útvega øki til endamálið.

Sjálvir hava teir hugsað um eitt øki niðri á havnarlagnum í Nesi í Hvalba, sum er einar 1000 fermetrar stórt.

Talan er um eitt øki, sum Búnaðarstovan eigur og á fundinum týskvøldið samtykti bygdaráðið einmælt at taka stig til at ogna sær økið og at lata stigtakarunum tað til endamálið.

# Mintust tey deyðu í ferðsluni

**Sunnudagin var minningardagur teirra deyði í ferðsluni. Higartil í ár hevur gingið illa, tí tað hava longu fýra fólk latið lív í ferðsluni**

MINNINGARDAGUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Sunnudagin, fyrsta sunnudag í juli, var minningardagur teirra deyðu í ferðsluni, og sætta árið á rað vórðu blómur løgd við tey støð, har fólk eru deyð.

Jón Kragesten á Ráðnum fyri Ferðslutrygd, sigur, at higartil í ár hevur gingið illa í ferðsluni í Føroyum.

– Tað eru longu fýra fólk deyð í ferðsluni í ár. Tey vóru øll ungdólk og børn, og tey vóru ávikavist 18 ár, 17 ár, 14 ár og 0 ár.

Hetta svarar til 8,3 fólk pr. 100.000 fólk.

Síðani 1928 eru 255 fólk deyð í ferðsluni í Føroyum, harav 207 síðani 1970.



*– Sunnudagin mintust vit tey, sum eru deyð íferðsluni og nógvastaðni vórðu blomstur løgd á søðum, har ferðslan hevur kravt mannalív. Tað stendur ikki væl tíl í ferðsluni í Føroyum, men kanska er vón fyri framman, heldur Ráðið fyri Ferðslutrygd*

Sostatt eru nógv fleiri fólk deyð í ferðsluni í Føroyum enn í Danmark

Jón Kragesten sigur, at fyrra hálvár í ár doyðu 2,8 fólk í ferðsluni í Danmark fyri hvørji 100.00 fólk.

Alt fjør doyðu 369 fólk í Danmark, ella 6,8 fólk pr. 100.000.

Hóast tað í Danmark hevur gingið framá í stórum seinastu árini, so eru danir als ikki nøgdir við støðuna. Teir vilja enn longur fram og vera á hædd við Noreg og Svøríki, har talið á deyðum pr. 100.000 er um 5,6. Í Noregi og Svøríki verður miðvíst arbeitt eftir Nullhugsjónini, sum er, at eingin skal doyggja ella fáa álvarsligt mein í ferðsluni".

– Fyri at gera nakað við støðuna í Danmark, verður av álvara arbeitt við ferðslutrygdarætlanum, sigur Jón Kragesten.

– Umframt upplýsing, verður dentur lagdur á gransking, at nýta hátøkni í akførum og veganetið og ikki minst at betra um eftirlitið hjá politinum.

Hon sigur, at í 2002 settu danir sum mál, at í 2012 skulu færri enn 300 fólk doyggja í ferðsluni. Í løtuni eru danir framman fyri tíðarætlanina og umhugsa nú at lækka málið fyri 2012 frá 300 niður í 250 fólk.

– Í Føroyum hava vit enn ongan skipaðan ferðslutrygdarpolitikk og vit hava ikki sett okkum ítøkilig mál at arbeiða í móti, hóast Ráðið fyri Ferðslutrygd í fleiri ár staðiliga hevur mælt til hetta, sigur hann.

### Vón fyri framman

Men Ráðið fyri Ferðslutrygd heldur, at vón er kanska fyri framman, við tað at landsstýrismaðurin í ferðslumálum í næstu tingsetu fer at seta fram lógaruppskot um, at endamálsorðingin í ferðslulógini verður grundað á Nullhugsjónina.

Í álitinum „Ávegis til Nullhugsjónina‰ sum Ráðið fyri Ferðslutrygd lat gera í 2003, verður m.a. mælt til, at:

Útbúgvingin at taka koyrikort til bil skal betrast og ungfólk millum 18 og 25 ár skulu fáa serligt royndarkoyrikort í 2 ár við serligum treytum

Koyrikort við stigaskipan skal setast í verk

Kravd undirvísing at fyri at taka koyrikort til prutl

Promillumarkið skal lækkast úr 0,5 niður í 0,2

Skaðanevnd at kanna álvarsligastu ferðsluóhappini verður sett

Venjingarbreyt/ hálkubreyt verður gjørd í Føroyum"

## Hægri P-bøtur

**Havn:** Tórshavnar býráð samtykti á fundi hóskvøldið í farnu viku, at taka undir við eini áheitan frá Runavíkar kommunu um P-bøturnar.

Henda áheitanin gongur út uppá, at báðar kommunurnar saman heita á Vinnumálaráðið um at hækka gjaldið fyri ólógliga parkering úr 200 upp til 300 kr.

Á fundinum var eisini eitt uppskot um at lækka gjaldið ístaðin við einari krónu niður í 199 kr., men tað fall á fundinum. Tí mugu fólk bara ansa sær betri, um tey ikki skulu fáa P-bót í framtíðini.

**sb.**

## Nýggj kloakkskipan

**Hestur:** Tórshavnar býráð hevur samtykt á fundi at farast skal undir arbeiðið at gera nýggja kloakk í Hesti. Hest kommuna fekk tilboð um gerð av arbeiðinum. Tað var P/f J&K Contraktors, ið hevði lægsta boð uppá góðar 2,4 mió. kr. við 6,25 % mvg.

Samlaði kostnaðurin við projektering, eftirliti og øðrum verður mettur til 3,2 mió. kr.

**sb.**



*Hestur fær nú nýggja kloakkskipan. Tað hevur Tórshavnar býráð samtykt*

## 10 grundøki seld

**Vestmanna:** Tað hevur gingið sera væl við søluni av grundøkjum í Vestri, síðan Vestmanna Kommuna lýsti við hesum í mars mánaði.

- Seld eru nú íalt 10 grundøki, og trý onnur eru umbiðin í løtuni, skrivar heimasíðan hjá kommununi..

Tað vórðu útstykkjað 25 grundøki í Vestri, og tvey onnur grundøki, sum eru í Miðalsbrekku.

Sigast má, at hetta heldur óvanliga stigið við at lýsa eftir keyparum til grundøki, hevur givið sera gott úrslit.

**sb.**